# Erla Kongsdóttir fyrsta sigurin á Skálafjørðinum

**5-MANNAFØR KVINNUR Fuglafjarðakvinnur settu alt ruddiliga upp á pláss, eftir at tær fyri viku síðani ikki vunnu**




Tróndur Arge

Eftir sigurin á Norðoyastevnu var tað so sjálvsagt, at Erla Kongsdóttir var favorittur, tá ið kapproður fyri stórari viku síðani var í Hvalvík. Men ta ferðina eydnaðist tað ikki kvinnubátinum úr Fuglafirði at vinna.

Leygardagin var eingin ivi, tá ið kapproður var á Skálafjørðinum. Erla Kongsdóttir vant burtur úr kappingarneytunum, og á málinum var munurin aftur til Drekan tvær bátslongdir. Drekin var í stórari kapping við Firvald og Blik um næstfremsta plássið.

Sigurin hjá kvinnunum úr Fuglafirði var merkisverdur á tann hátt, at hetta var fyrsta ferðin nakrantíð, síðani tað í 1973 varð farið undir FM kapproður í tí líki, sum hann síðani hevur verið, at Erla Kongsdóttir hevur vunnið á Eystanstevnu.

Sigurin var dyggari hesa ferð, enn hann var, tá ið Erla Kongsdóttir vann á Norðoyastevnu. Ta ferðina var fjarstøðan aftur til Drekan fimm sekund. Leygardagin var munurin aftur til Drekan meiri enn seks sekund.

1 Erla Kongsdóttir 05:24.00
2 Drekin 05:30.07
3 Firvaldur 05:31.23
4 Blikur 05:32.21
5 Havfrúgvin 05:44.12

Støðan
1 Erla Kongsdóttir 20
2 Drekin 19
3 Firvaldur 14
4 Blikur 13
5 Havfrúgvin 9

# Sølmundur á FM kós

**6-MANNAFØR KVINNUR Eingin tykist hava møguleika at fáa fatur á Sølmundi, sum hvønn leygardag skrivar søgu**

Tróndur Arge

Ein av størstu favorittunum at vinna FM er Sølmundur við kvinnumanning. Hesa ferð var Sølmundur í heimasjógvi. Beinanvegin, tá ið startskotið hevði gelt ikki so langt úr neystinum, har kvinnurnar hava vant í nógvar mánaðir, legði Sølmundur seg fram um hinar bátarnar, og so var tað bara ein spurningur, hvussu stórur og tryggur sigurin hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ kvinnunum fór at verða.

Hvessingur royndi at hanga í, og á málinum var munurin ein bátslongd. Einki bendi á, at tað á Jóansøku komandi leygardag verður nakar annar enn Sølmundur, sum fer at vinna.

Hvørja ferð Sølmundur vinnur, so skrivar hann søgu. Sølmundur við kvinnumanning hevur ongantíð vunnið FM, og Sølmundur við kvinnumanning hevði ongantíð vunnið, áðrenn tær á Norðoyastevnu vóru fremstar.

Tíðin hjá Sølmundi var rættuliga góð. Bara eina ferð áður hevur vinnarabáturin í hesi kappingini verið skjótari á mál á Eystanstevnu. Tað var í 2006, tá ið Riddarin vann í tíðini 4.54.20 ella nett 15 sekund skjótari enn Sølmundur.

1 Sølmundur 05:09.20
2 Hvessingur 05:12.22
3 Gongurólvur 05:18.20
4 Riddarin 05:18.22
5 Lómur 05:23.12
6 Jarnbardur 05:34.18

Støðan
1 Sølmundur 21
2 Hvessingur 18
3 Gongurólvur 14
4 Riddarin 13
5 Lómur 9
6 Jarnbardur 6

# Tað gekk sum tað plagar

**BARNARÓÐUR Kappingin var stór, men enn eina ferð vunnu genturnar av Argjum og dreingirnir úr Havnar Róðrarfelag**

Tróndur Arge

Kappingin var í báðum førum stór og tøtt, men tá ið bátarnir fóru um málið, vóru sigurshrarnarnir teir somu, sum teir vóru í tveimum teimum fyrstu kappingunum.

Teistin úr Argja Róðrarfelag vann barnaróðurin millum gentubátar, og Títlingur hjá Havnar Róðrarfelag vann kappingina millum dreingjabátarnar

Í gentukappingini var munurin millum lítil og eingin, og í dreingjakappingini var skuturin á muni millum Títling og Havfrúnna úr Vestmanna, sum fyri triðju ferð var næstfremst í dreingjakappingini.

# Tríggir vinnarar eru um FM boðið

**5-MANNAFØR GENTUR Vágarnar settu rættuliga dám á tøttu kappingina millum gentumanningarnar, tá ið Beinta úr Miðvági vann, og Ørnin úr Sandavági endaði sum nummar trý**

Tróndur Arge




Gongdin og úrslitini í trimum teimum fyrstu kappingunum boða frá, at mest spennandi FM kappingin av øllum er tann millum 5-mannafórini við gentumanning.

Í Klaksvík vann Sílið, í Hvalvík vann Falkur, og á Eystanstevnu var tað Beinta úr Miðvági, sum kom fyrst á mál. Skiftandi úrslitini bera við sær, at tað er sera tætt millum tríggjar bátar í FM kappingini: Falkur hevur 19 stig, og Beinta og Sílið hava 17 stig!

Beinta var nummar trý bæði á Norðoyastevnu og á Sundalagsstevnu. Í fyrsta FM róðrinum var Beinta 15 sekund frá fremsta plássinum, og næstsíðsta leygardag var Beinta fýra sekund frá fremsta plássinum.

Hesa ferð var kappingin so tøtt, sum tað ber henni til at vera. Beinta og Falkur komu mest sum í senn á mál, og fjarstøðan aftur til Ørnina og Sílið var tilsaman minni enn ein bátslongd.

Soleiðis sum gongdin hevur verið higartil, so er tað ikki óhugsandi, at ein fjórði bátur kann fara at bjóða seg fram sum vinnara. Saman við Beintu hevur framgongdin hjá Ørnini verið tann størsta. Á Norðoyastevnu var Ørnin nummar sjey – 31 sekund frá vinnaratíðini. Á Sundalagsstevnu var Ørnin nummar fimm – 14 sekund frá vinnaratíðini. Og leygardagin varð Ørnin nummar trý – eitt sekund frá vinnaratíðini!

1 Beinta 05:31.09
2 Falkur 05:31.15
3 Ørnin 05:32.15
4 Sílið 05:33.01
5 Tjaldrið 05:39.17
6 Silja 05:43.02
7 Tambar 05:53.14

Støðan
1 Falkur 19
2 Beinta 17
3 Sílið 17
4 Tjaldrið 11
5 Ørnin 9
6 Silja 6
7 Tambar 3
8 Fípan Fagra 2